

*Torleif Sigurðsson varð heiðraður, sum tað sømir seg, tá hann fyri tveimum árum síðani legði frá sær sum FSF-formaður. Longu undan hesum hevði hann givið samstarvsfeløgum sínum í nevndini eitt greitt tekin um, at eitt ættarliðsskifti stóð fyri framman*

# Miðvís útskifting

**Nevndin hjá FSF varð í tvey tíggjáraskeið mannað við at kalla óbroyttari manning, men seinastu árini tykist ein miðvís útskifting vera farin ígongd**

FSF-UPPGERÐ
*Jákup Mørk*

Drúgvasti formaðurin í FSF-søguni, Tórleif Sigurðsson, róði longu fyri trimum árum framundir, at tað væl kundi vera so, at ein tiltrongd útskifting av nevndarlimunum stóð fyri framman.

Longu á aðalfundinum í 2001 helt hann fyri, at tað kundi vera sera óheppið, at talan at kalla altíð var um afturval av somu nevndarlimum. Í formansfrágreiðingini ta ferðina helt formaðurin fyri at »Flestu nevndarlimirnir í FSF hava sitið í mong ár í nevndini. Hetta ávirkar virkisfýsnið, og vil eg heita á mínar samstarvsfelagar í nevndini um til eina og hvørja tíð at vera kendir við støðuna«.

Tað er lítið at ivast í, at hetta var ein beinleiðis áheitan til bæði feløg og nevndarlimir um, at tað helst vildi verið upp á sítt pláss við eini útskifting, og at formaðurin við hesum kanska vildi heita á nakrar nevndarlimir um sjálvir at finna hurðina, áðrenn onnur gjørdu tað fyri teir.

Síðani hevur tað so víst seg, at hóast hesi orðini, so er Torleif Sigurðsson sjálvur tann einasti av táverandi nevndarlimunum, sum sjálvur hevur funnið hurðina. Men tað merkir so á ongan hátt, at útskiftingin er steðgað.

Á aðalfundinum fyri tveimum árum síðani varð Jákup Simonsen at kalla varpaður út, tá hann meira ella minni gjørdist offur í taktiska spælinum um, hvør skuldi verða eftirmaðurin hjá Tórleif Sigurðsson. Og fyri einum ári síðani tvetti Børge B. Hansen í seinastu løtu handklæðið í ringin, tá tað stóð greitt í bæði sól og mána, at mótvalevni hansara til sessin sum næstformaður, Niklas á Líðarenda, fór at fáa dygga undirtøku frá aðalfundinum.

## Miðvís útskifting

Tað vil við øðrum orðum siga, at av teimum, sum ígjøgnum eitt drúgt áramála hava mannað nevndina í FSF, eru tað bert Jens Erik Magnussen, Óli Holm og núverandi formaðurin, sum eru eftir, og í eini sjeymanna nevnd er tað ikki nóg mikið til at tryggja eini innanhýsis uppbakking av verandi formanninum.

Hetta tykist tó ikki at nerva Dánjal Andreasen. Her á blaðnum fingu vit ikki orðið á formannin, áðrenn blaðið fór til prentingar í gjár, men við Dimmalætting segði hann, at »Tað er aðalfundurin, sum ger av, hvør skal vera formaður, og ikki starvsnevndin«, men hann viðgekk tó samstundis, at tað væl kundi vera, at hansara støða var viknað nakað, tá hansara egna nevnd ikki tekur undir við sær.

Men stori spurningurin í øllum hesum tykist vera, hvørt tíðin hjá »gomlu« nevndarlimunum ikki er um at vera runnin. Og onkursvegna tykist gongdin síðani formansrøðuna í 2001 vera tann, at ein miðvís útskifting av nevndini er í ferð við at fara fram.

Tað skerst heldur ikki burtur, at hesa fjórðingsøldina, sum FSF hevur verið til, hava nevndirnar í flestu fótbóltsfeløgunum kring landið verið ígjøgnum eitt ættarliðsskifti, og tí hava teir »gomlu« kanska ikki heilt so gott tak á viðleikarunum longur, sum teir áður hava havt, og kanska verður teirra arbeiði ikki longur virðismett eins høgt longur, sum tað áður hevur verið.

Tí tykist tað í løtuni standa greitt, at tíðarskeiðið hjá eini drúgvari nevnd í føroyskum ítrótti er um at vera runnið. Danin vildi kanska sagt, at ein epoka nú er um at vera av, og kanska var tað hetta, sum Torleif Sigurðsson hevði lagt til merkis longu, tá hann sat og skrivaði formansfrágreiðingina tíðliga í 2001. Og kanska hevði hann eisin longu tá tikið sína egnu avgerð um, at hann tá fór undir sítt seinasta ár sum føroyski fótbóltsbossurin.


í Býin

Klaksvíkar Klubbi Tel 455681



Fríggjakvøldið
Kl. 17 Fimmari
Leygarkvøldið (opið frá kl. 22)
Kl. 24 Dansur - Jákup Marnar og Heini spæla
Sunnudagin
Kl. 15 Sjavskapping



BÍLEGG PIZZA FRÍGGJANÁTT OG LEYGARNÁTT



HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Vilt tú bil hýra - ring 311234
Nú fáast eisini Talutíðarkort
Føroya Tele Kall
BENZIN DIESEL KIOSK
AUTO 311234

í Býin



LEYGARKVØLDIÐ 31.01
DJ SVENDSEN
Alt tað besta frá 70inum og 80inum krydda við tí besta nýggja.
20 ára aldursmark
PLATFORM
MAERSK AIR



Fríggjakvøldið *30. januar*
DISKOTEK
Bogi Joensen, skipar fyri
Leygarkvøldið *31. januar*
DISKOTEK
Bogi Joensen, skipar fyri
*Happy Hour millum 23-24*
*Ladiesnight til kl. 01*
*18 ára aldursmark*
BAROK

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Koyrt verður leygarkvøld:

Vágaleiðin (tlf. 217753)
• Sørvágur - Tórshavn kl. 23.00
• Miðvágur - Tórshavn kl. 23.15
• Sandavágur - Tórshavn kl. 23.30
• Tórshavn - Vágar kl. 04.30

Vestmannaleiðin (tlf. 217752)
• Vestmanna - Tórshavn kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna kl. 04.30

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254

Klubbadansur
Leygarkvøldið 31. januar
MOONSHOT
HAVNAR KLUBBI Stovnaður 1799

club KAGGIN
Hóskvøldið spæla
Brim
Ókeypis atgongd • double up kl. 21.00-22.00
Fríggjakvøldið spæla
ARGJAMENN
Leygarkvøldið spæla
ARGJAMENN
www.kaggin.fo

felagið TÓRSHØLL
í vikuskiftinum spæla
FLÚRAR
Leygarkvøldið 31. januar kl. 20.00 - Ræstkjøtaveitsla - tekningarlisti liggur frammi
Ókeypis atgongd í kjallaranum fríggjakvøld og leygarkvøld



Hóskvøldið
20.00-20.30 Sertilboð Kr 10,- Think Big
21.00-23.30 Spæla Jóan Petur á Stongunum & Finnur Jensen
Fríggjakvøldið
15.00-22.00 Ø tilboð
20.00-22.00 Double Up
Leygarkvøldið
20.00-22.00 Double Up
23.00 Dansur við Fluffy Toys - ókeypis, sjálvandi
YERTSHÚSIÐ
Vit hugsa um figgjarlógina hjá ungum fólki



fk Mat-seðilin
Hósdagin 29. jan: Bollar í karry & Hamburgarryggur
Fríggjadagin 30. jan: Kalkunbringa & Entrécóte
Leygardagin 31. jan: Svínakambur
Mánadagin 2. febr: Milliónbúffur & Stoktir høsnarungar
Týsdagin 3. febr: Hakkibúffur & Boston steik
Mikudagin 4. febr: Kalvafrikassé & Fiskafrikadellir
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 22,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 30,00
Matstovan í Hoyvík